

sansir.fo

# Starvsfólk til KT-deildina á Føroya Tele

**Vit kunna bjóða einum komandi starvsfelaga eitt spennandi arbeiðs-umhvørvi, har avbjóðandi uppgávur og menningarhugur eru í hásæti.**

**Arbeiðsinnihald:**
KT deildin á Føroya Tele søkir eftir einum starvsfólki, sum skal vera við í menningargongdum - frá hugskoti, tilevning og íverksetan til viðlíkahald av KT- loysnum.

Amboðini, sum verða nýtt, eru fyri tað mesta partur av Oracle:

- Oracle Forms, Reports, PL/SQL.
- JDeveloper, Java og ADF.
- Oracle Enterprise Server og Workflow

Harumframt verður eisini arbeitt við Microsoft og open source.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving so sum verkfrøðingur, dátafrøðingur og/ella viðkomandi royndir.

KT-deildin arbeiðir tætt saman við hinum deildunum á Føroya Tele, og tí er neyðugt, at tann, ið settur verður, er fyrikomandi og dugir væl at samstarva. Eisini er neyðugt at kunna arbeiða sjálvstøðugt og í toymi.

**Umsókn og starvsviðurskifti:**
Setanarviðurskifti og løn verða ásett eftir avtalu. Møguleiki er fyri lagaligari arbeiðstíð.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Michael Thomsen, KT-leiðara, á tel 30 30 30.
Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 26. mai 2008 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

ella
starvsfolkadeildin@ft.fo

Føroya Tele er fremsta KST fyritøka í Føroyum. Felagið er eitt samtak við einum móðurfelagi og trimum dótturfeløgum.
KT-deildin er partur av móðurfelagnum, og á KT-deildini starvast 11 fólk.

FØROYA TELE



# Leiðari til Eik Klaksvík

Vit sóknast eftir leiðara til deild okkara í Klaksvík

Eik

**Starvið**
Á deildini í Klaksvík veita vit tænastur til privat- og vinnukundar í Norðoyggjum. Sum leiðari hevur tú ábyrgdina av at styrkja støðuna hjá Eik Banka í Norðoyggjum og mást duga og vilja at standa fram sum umboð fyri Eik. Tú verður leiðari fyri fimm fólkum og saman skulu tit tryggja, at deildin altíð livir upp til aðalvirðini í Eik at vera professionell, innlivandi og nýhugsandi. Sum leiðari fært tú ábyrgdina av at samskipa og leggja til rættis dagliga arbeiðið, og seta langtíðarmálsetningar fyri deildina.

Trivnaður, arbeiðsgleði og toymisandi hjá starvsfólkunum hevur avgerandi týdning fyri Eik, og eisini á hesum økjum skalt tú sum leiðari vera virkin.

**Ynskiligir fakligir førleikar**

- Tú hevur peningastovnsútbúgving
- Tú hevur leiðsluroyndir

**Ynskiligir persónligir eginleikar**

- Tú hevur góð samstarvsevni
- Tú dugir væl at samskifta og virka í einum umhvørvi í støðugari broyting og menning
- Tú hevur lætt við at taka avgerðir
- Tú eggjar øðrum til og torir at ganga á odda

**Vit bjóða**
Ein fjølbroyttan arbeiðsdag í einum spennandi og avbjóðandi starvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Starvið verður sett sum skjótast og verður lønt sambært avtaluni millum AFF og SFS.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tel 348510, teldupostur marjun.eystberg@eik.fo
Umsóknir skulu verða Eik Banka í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 27. mai 2008. Tær skulu stílast til:

**Eik Banki**
Att.: Marjun Eystberg,
starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Í Eik-samtakinum starvast á leið 400 fólk á 16 deildum kring landið, í dótturfelagnum Inni og í dótturfelagnum Eik Bank Danmark A/S. Á deildini í Klaksvík starvast 6 fólk.

www.eik.fo